# Fortíðin er farin – framtíðina ku




*Tað var ein fegin stjóri á Høvdavirkinum í Leirvík, Eirikur á Húsamørk, sum takkaði fyri heiðurin*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

## Dómsnevndin ivaðist ikki í Høvdavirkinum

**Á vinnudegnum í Norðurlandahúsinum seinasta fríggjadag grundgav dómsnevndin, sum velir út Ársins Virki og Ársins Átak, fyri sínum vali. Um valið av Ársins Virki sigur dómsnevndin:**

Við val av ársins virki skal metingarnevndin taka sína støðu út frá hesum krøvum:

- Virkið skal hava víst framfýsni og áræði innan eitt nú útflutning, vørumenning, tøknifrøði, útbúgving ella innan annað øki, og hetta skal eftir stytri áramál hava viðført menning og vøkstur,

- Virkið skal hava verið støðugt/vaksandi, og dentur verður lagdur á fíggjarligt úrslit seinastu árini,

- Virkið skal vilja trína alment fram sum vinnari av kappingini sum Ársins virki.

Undanfarin ár hevur valið náttúrliga staðið millum virki, sum gjøgnum fleiri ár hava prógvað sítt virði í mun til tað metingargrundarlag, sum verður nýtt. Við tí opinleika og gjøgnumskygni, sum nú er tøkt og alment, eru møguleikarnir fyri vali av ársins virki vorðnir víðari, enn teir hava verið. Tað hevur – eins og undanfarin ár – verið trupult at valt í millum tey virki, sum kunnu koma upp á tal, men nevndin hevur í ár valt at heiðra eitt nýtt virki, sum framum onnur hevur lagt seg eftir at ganga nýggjar leiðir - í framleiðslu, vøruvali og útflutningi. Og tað við góðum fíggjarligum úrslitum. Í javnbýttum samstarvi við útlendskar fyritøkur við kunnleika um marknað og tøkni, hevur virkið troytt lítið brúktar partar av tí tilfeingi, sum er tøkt í Føroyum.

Talan er um eina tænastufyritøku hjá fiskavirkjum, sum bjóðar eina heildarloysn fyri høvd og ryggir, sum hon turkar og selir á nigerianska marknaðinum, har serliga turkaðu høvdini eru ein delikatessa. FMP ella Høvdavirkið í dagligari talu gagnnýtir hita, sum annars hevði farið upp í royk, og hevur gjørt stórar íløgur í arbeiðssparandi tøkni og digitala stýring av góðskuni; talan er jú um liðugvøru til endabrúkaran. Stýriskipanir og fleiri av maskinunum eru mentar til Høvdavirkið og onkur er enn eindømi í heiminum.

Sjálvt um marknaðurin við sínum í hvussu so er 120 miljónum íbúgvum er stórur (triðingurin av ES-marknaðinum) og í vøkstri, hevur hann fyrr verið viðbrekin, og FMP roynir tí støðugt at finna nýggjar framleiðslur og marknaðir fyri at kunna bjóða føroyskum og útlendskum virkjum innan fiskivinnu og alivinnu tænastur at virka nýggjar og kendar vørur til sermarknaðir. Talan er sostatt um týðandi undangongu innan føroyska fiskavirking.

Høvdavirkið er í dag eitt gott arbeiðspláss fyri u. 60 starvsfólkum, umframt at tað gevur einum hópi av skúlanæmingum 2–4 tímar arbeiðsdag, tá nóg mikið er av rávøru. Fyritøkan hevði í 2004 eitt ognaravkast upp á 23% (í meðal hevur ognaravkastið tey 3 árini, virkið hevur verið í fullum rakstri, verið góð 25%) og eitt eginpeningsavkast upp á 42 %. Eginpeningurin var upp á knappar 14 miljónir krónur og soliditeturin 50%. Nevndin hevur tí ikki ivast í at velja P/F Faroe Marine Products – Høvdavirkið – til ársins virki 2005.



**Millum røðararnar á vinnudegnum, sum Vinnuhúsið skipaði fyri seinnapartin fríggjadagin, var eitt nú landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Bjørn Kalsø sum serliga tosaði um altjóðagerð og alheimsgerð**

VINNUDAGUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Bjørn Kalsø fegnaðist um, at eftir fáum árum er tað vorðið siðvenja, at hetta er dagurin, har vinnulívsfólk úr øllum landinum koma saman at viðgera stóru málini – møguleikar, avbjóðingar og trupulleikar, sum hann tók til.

- Fyrr kundu vit siga, at tað, sum er avbjóðingin hjá grannunum í dag, verður okkara avbjóðing í morgin. Her var ein ávís tillagingartíð. Men í globalu landsbygdini eru avbjóðingarnar mangan tær somu um allan heimin samstundis. Tískil gerst tillagingartíðin lítil og eingin.

### Altjóðagerð

Landsstýrismaðurin helt fyri, at vit øll helst hava eina hóming av, hvat altjóðagerð og alheimsgerð fevna um.

- Uttan at fara í smálutir, kunnu vit bólka orð, hugtøk og umstøður sum marknaðaratgongd, fríhandil og lágan flutningskostnað sum eyðkenni fyri alheimsgerðina.

Hann vísti á, at viðhvørt kanst tú fáa ta fatan, at hesi rák, sum vit ikki sleppa undan, eru rótin til alt ilt og fáa skyldina fyri alskyns vanlukkur, sum raka okkum og okkara búskap.

- Men her veldst sjálvandi um fokus og perspektiv. Hyggja vit eftir vandum, síggja vit vandar, men hyggja vit eftir møguleikum, síggja vit møguleikar.

### Ov varin

Landsstýrismaðurin segði, at okkara fiskivinnusøga er